HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

21. mars 2017
**Mál**: 16/01399-9
**Tygara Skriv**:
**Viðgjørt**: KHP

*Góðkenningarskriv*

**Broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Velbastað**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Tórshavnar kommuna við skrivi, dagfest 21. desember 2016, sent uppskot til almennu byggisamtyktini fyri Velbastað til góðkenningar.

Broytingin snýr seg um, at uml. 225 m2 av matr. nr. 1a ímillum vegirnar Norðuri á Heyggi og Norðuri á Trøð á Velbastað verður broytt frá H-frílendi til B-sethúsaøki.

Orsøkin er, at eigarin av matr. nr. 14, sum er B-sethúsaøki, hevur gjørt avtalu við eigaran av matr. nr.1a, sum er H-frílendi, um at keypa part av matr. nr. 1a fyri at leggja saman við matr. nr. 14.

Broytingin hevur ligið alment frammi frá 7. til og við 28. november 2016. Tá freistin at koma við møguligum broytingaruppskoti ella mótmæli var farin, 19. desember 2016, hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og hevur í ummæli sínum, dagfest 14. februar 2017, mælt til, at broytingin verða góðkend..

Heilsu- og innlendismálaráðið tekur undir við viðmerkingini frá Býarskipanarnevndini.

Sagt verður frá, at Heilsu- og innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir at byggisamtyktin fyri Velbastað verður broytt sum omanfyri nevnt.

Mint verður á, at hóast ein byggisamtykt er góðkend av ráðnum, so sleppur kommunan ikki undan at tryggja at øll onnur loyvi vera fingin til vega, áðrenn farið verður undir at byggja, til dømis frá friðingarmyndugleikanum, sum sambært aðrari lóggávu kann seta krøv til bygningar

Hjálagt rættað kortskjal fyri Velbastað við átekning frá Heilsu- og innlendismálaráðnum.

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo



| HEILSU -OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 16/01399 |
| Ætlanarskriv: | 27/2 - 2017 |
| Góðkent: | 21/3 - 2017 |
| Váttað: | [signature] |

| | |
|---|---|
| B: Sethús | H: Frílendi |
| C: Vinnuendmál | H1: Friðað øki |
| D: Ferjuhavn | J: Bóndahús |
| E: Almennir stovnar | K: Landbúnaður |
| F: Alment frítíðarøki | |
| G: Neyst og bátapláss | |

## Byggisamtykt fyri Velbastað

Góðkend: 27/1-2004 (Oljumálaráðið)
Seinast broytt: 27.02.2017